gult20 cyan20 magenta20 svart20



KÍ-FS Vágar 2-0 (0-0)

# Klaksvíkingar vóru illa sperdir

*Leingi høvdu vágamenn takið á heimaliðnum, men seinastu løtuna fekk KÍ tvey vøkur mál og trý kærkomin stig*
*Mynd: SjH*



**Vágamenn høvdu stórar møguleikar at avgera sær til fyrimunar, áðrenn teir ikki orkaðu meiri, og so skoraði KÍ tvey flott mál**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Klaksvíkingar vunnu sunnudagin trý kærkomin stig. Eftir 4–0 og 5–0 tap kom tað væl við hjá KÍ, at teir megnaðu at basa botnliðnum, og tað mundi kennast sum ein orduligur lætti. Tí sannleikin er, at tað leyp einki av hjá KÍ.

FS Vágar var ikki komið til Klaksvíkar at spæla fyrstu violin í undirhaldi. At teir taptu 2–0 er at liva við. Avrikið bar boð um, at tað hjá Albertil Ellefsen og Jonhardi Joensen gongur rætta vegin. FSV fer at fáa okkurt stigið afturat, og tað skuldi ikki undra, um tað verður undan summarsteðginum.

Men tað er einki at siga til, um vágamenna iðra seg um, at teir einki fingu við til hús. Tí sannleikin er, at teir høvdu tríggjar risastórar møguleikar at leggja seg á odda. Tann fyrsta fingu teir beinanvegin, men lobbarin hjá Tór–Ingari fór í føvningin á Meinhardi Joensen, sum royndist fínur aftasti skansi hjá KÍ. Í 2. hálvleiki, tá KÍ hevði hug at flyta seg alt longri fram, vóru bæði Sonni Johansen og Tór–Ingar Akselsen púra leysir við KÍ málverjanum, men Meinhard kom væl út og blokeraði skotroyndirnar.

Um onkur av hesum royndunum hevði givið mál, hevði FS Vágar ivaleyst fingið eyka orku. Gongdin hesa ferð var tann, at tað í 2. hálvleiki gjørdist alt týðuligari, at venjingarstøðan er ikki tann, sum hon eigur at vera, og so taptu teir.

## Sjálvsálitið

KÍ liðið var týðuliga merkt av, at spælararnir nýliga høvdu lagt rygg til tvey stórtap. Fyrsta stóra tíman var ferðin lítil, møguleikarnir at spæla vóru ov fáir hjá bólthaldaranum, mesta samanspælið var tvørtur um aftarlaga á vøllinum, og vandamiklu gjøgnumbrotini í borðunum vóru fá ella rættari sagt næstan eingi.

Endin á álopunum var oftast, at høgir bóltar vórðu lyftir inn í brotsteigin, og har hevði tryggi FSV málverjin, Arturas Ramoska, mest at siga, og harafturat vóru FSV verjuspælararnir við Jack Johansen á odda rættuliga stinnir.

Sum seinna umfarið leið, datt alt meiri á FSV hálvuna, men tað var lítið, sum bendi á mál. Skotroyndirnar úti frá restaðu, og hugflogið í samanspælinum varð ikki størri.

So var tað, at ein av ungu monnunum tók søkina í egnar hendur. Símun Joensen sveiggjaði vinstra beinið, og úr 22 metrum og eitt lítið vet til vinstru streyk bólturin umvegis handara stólpan og í netið. Áskoðarafjøldin vaknaði, spælararnir tordu betur, og tá luftin í gestunum var burtur, sóust síðstu løtuna fleiri væl spæld álop.

Alexander Djordjevic snittaði við fremra stólpan til 2–0. Innleggið úr vinstru átti Rógvi Laksáfoss, sum er ein av ungu og evnaríku KÍ monnunum. Hann var stutt frammanundan komin á vøllin – fyri fyrstu ferð í landskappingardysti.

## Framtíðin

Vágamenn taptu, men teir hava orsøk at byggja víðari upp á tað, sum teir vístu. Fyrsta treytin er at venjingarstøðan verður betur, enn hon er. Sum vit nevndu í síðstu viku, so verður neyðugt hjá Alberti Ellefsen, Jonhardi Joensen og spælarunum at fáa konditiónina upp á pláss, áðrenn tað fyrst í august verður farið undir tey síðstu átta umførini. At nógvir ungir vágamenn eru á liðnum, átti at gjørt tað hugaligt.

Í Klaksvík hevur stórur turbulensur verið tær seinastu vikurnar, og spurningurin er framvegis, um bylgjurnar hava lagt seg.

Tað verður aftur og aftur sagt, at teir eru mitt í ættarliðsskifti, men tað er ikki altíð so lætt at fáa eyga á nýggja ættarliðið. Hesa ferð vóru fýra av nýggju monnunum við frá fyrsta bríksli: málverjin Meinhard Joensen, verjuspælarin Atli Danielsen, miðvallarin Símun Joensen og álopsmaðurin Hjalgrím Elttør. Afturat teimum komu Erling Fles og Rógvi Laksáfoss á vøllin. Spuringurin er so, um KÍ fer at varðveita unga fólkið í eini tvey ár, ella um teir, sum tað ofta hevur víst seg áður har norðuri, fara aðra staðni, tá teir eru búnir at lyfta liðið fram til sigrar og harvið heiðursmerkjapláss.

**KÍ-FS Vágar 2-0 (0-0)**
1-0: Símun Joensen 80
2-0: Aleksander Djordjevic 85
Dómari: Birgir Sondum (B36)

**KÍ:** Meinhard Joensen – Atli Danielsen, Jan Andreasen, Niclas Niclasen – Harley Bertholdsen, Jan Joensen, Tomislav Sivic, Símun Joensen, Rúni Elttør – Alexander Djordjevic, Hjalgrím Elttør
**FS Vágar:** Arturas Ramoska – Ruslan Screlea, Vlad Osipov, Poul Kjartan Thomsen, Jack Johansen – Tór–Ingar Akselsen, Hannus Olsen, Jan Nielsen, Kim Poulsen – Sonni Johansen, Petur Niclasen

# Manslandsliðið í flogbólti úttikið

**Pascu Romica, venjari hjá manslandsliðnum í flogbólti, hevur úttikið teir tólv leikararnar, sum skulu umboða Føroyar á Oyggjaleikunum á Isle of Man um góðar tvær vikur**

FLOGBÓLTUR

Nú seinastu fyrireikingarnar áðrenn farið verður til Oyggjaleikirnar hevur venjarin hjá manslandsliðnum í flogbólti gjørt av, hvørjir teir tólv menninir vera, sum skulu mynda føroyska landsliðið.

Leikararnir á liðnum eru:

**Úr Fram:** Rúni Weihe (ársins verju- og móttøkuspælari), Suni Juul Petersen (ársins stjørnuskot), Ragnar Petersen, Heiðrikur Bergsson og Høgni Viderø.
**Úr ÍF:** Odd Eliasen (ársins hevari) og Bartal Eliasen
**Úr Fleyr:** Steinar Eirikstoft og Andrass Jógvansson
**Úr SÍ:** Suni Hansen
**Úr Marienlyst:** Bárður B. Mikkelsen
**Úr Frederiksberg Volley:** Sigmundur av Teigum

Sum tað sæst á úttøkuni, er hetta liðið væl yngri enn tað, sum var við til oyggjaleikir seinast. Fleiri av gomlu stuðulsleikarunum á landsliðnum hava takkað fyri seg í landsliðshøpi og tað merkir, at yngru leikararnir, sum Suni Juul Petersen, Steinar Eirikstoft og aðrir, skulu taka við.

Grundstamman á landsliðnum er kortini samansett av leikarum, sum hava sera drúgvar royndir bæði á landsliðnum og í felagshøpi. Teirra millum kunnu nevnast Suni Hansen, Odd og Bartal Eliasen og Rúni Weihe, sum hóast hann bara er 21 ára gamal, er ein av royndu leikarunum á landsliðnum.

Uttanífrá koma so Bárður B. Mikkelsen og Sigmundur av Teigum, sum í fleiri ár hava búð og spælt flogbólt uttanlands. Eingin ivi er um, at tað, at teir eru við í útlendskari kapping, búnar teir meira sum leikarar, og tað er aftur nakað, sum gagnar landsliðnum tá tað er við í stórum altjóða kappingum, sum Oyggjaleikirnir eru vornir til.

Liðið, sum fer, hevur eitt triðjapláss at verja og hóast tað kann tykjast møtumikið við nógvum nýggjum leikarum á liðnum, so fer liðið avstað við vónum um eitt gott úrslit. Leikararnir hava vant nógv upp undir hesa kappingina og skulu venja fýra ferðir afturat áðrenn farið verður avstað, og einki er at ivast í, at teir fara at leggja alla orku í at fáa eitt líka gott úrslit sum seinast.

Venjari hjá føroyska manslandsliðnum í flogbólti seinastu bæði árini er rumenin Pascu Romeca, sum hetta seinasta kappingarárið hevur verið venjari hjá Fram. Liðleiðari á ferðini til Isle of Man verður Tummas Óli Mortensen.

gult21 cyan21 magenta21 svart21



# Jákup framvegis í bíðistøðu

**Men tað liggur í luftini, at avgerðin um framtíðar arbeiðsgevaran hjá landsliðsmálverjanum verður tikin fyrsta dagin**

DANMARK
*Jóannes Hansen*

Jákup Mikkelsen er framvegis á lønarlistanum hjá Herfølge. Men tað verður hann ikki leingi afturat. Eftir 30. juni er tað søga, at Herfølge er eitt av føroysku feløgunum í donskum fótbólti.

Stóri spurningurin hjá Jákupi Mikkelsen og øllum fótbóltshugaðu føroyingunum, sum fylgja við Jákupi og fótbóltsframtíðini hjá honum, er, hvør nýggi arbeiðsgevarin verður.

Tað hevur ljóðað, at fleiri feløg í Danmark hava víst áhugað, og at okkurt útlendskt felag eisini hevur verið inni í myndini.

Jákup Mikkelsen hevur lært seg at tiga og einki siga. Donsku ítróttartíðindamenninir eru grammir eftir at fáa søgur, og tað skal lítið til, áðrenn teir síggja sær møguleika at fáa



*Enn er einki avgjørt um, hvar Jákup Mikkelsen fer at spæla eftir summarfrítíðina*

eina yvirskrift burturúr.

– Í síðstu viku ringdi ein tíðindamaður og spurdi, um tað var nakað nýtt um framtíðar fótbóltsstøðuna hjá mær. Eg svaraði honum, at tað var einki nýtt. So spurdi hann meg, um eg fór beinleiðis til Føroya. Eg svaraði honum, at tað kundi vera, at eg fór til Bretlands at venja á vegnum. Tað var heilt skjótt, at eg sá á tekst tv, at nú var eg á veg til Bretlands. Eg havi sjálvandi leingi vitað, at tú skalt ansa tær, tá tú tosar við tíðindamenn, og tað var henda søgan ein áminning um. Samrøðan okkara millum var mest sum liðug, tá hetta soleiðis hissini kom fram.

## Skjót gongd

Tað hevur ljóðað, at fleiri feløg í næstbestu deildini í Danmark hava víst áhuga fyri at gera sáttmála við Jákup Mikkelsen, og tað hevur eisini ljóðað, at okkurt felag í bestu deildini hevur verið upp á tal. Men Jákup ynskir ikki at siga nakað um nakran møguleika. Tað einasta, sum vit fáa at vita frá honum, er, at tað er rættuliga sannlíkt, at av gerðin um fótbóltsframtíðina fer at fella um ikki so langa tíð, og tað vil í hesum sambandinum siga innanfyri eina ella tvær vikur. Leygardagin er 30. juni, og tað vil siga, at sunnudagin er sáttmálaskeiðið hjá Jákupi í Herfølge liðugt.

Tað er nógv lív í europeiska fótbóltsheiminum í løtuni. Nógva staðni í Europa fara feløgini undir venjingina til nýggja kappingarárið, tá henda vikan er liðug. Á internetinum eru tíðindi um keyp og sølu av nógvum spælarum, og tað kann vera so skjótt, at okkurt felag hevur fer at hava tørv á einum málverja, og so kann tað vera, at tað verður skjótt bortið at.

## Møguleikarnir

Í Danmark eru tað trý feløg í bestu deildini, sum ikki hava havt sáttmála við málverja fyri alt tað nýggja kappingarárið. FCK hevur havt leigusáttmála við norðmannin Thomas Myhre, ið hevur verið sáttmálabundin at Everton. Eingilska felagið hevur givið norðmanninum loyvi at gera sáttmála við okkurt annað felag. FCK vil fegið hava norska landsliðsmálverjan at halda fram í felagnum, men útsøgnirnar hjá honum benda á, at hann ætlar sær at kroysta sitrónina, áðrenn hann skrivar undir. Thomas Myhre hevur roynst væl í FCK. Tað veit hann væl sjálvur. Hann sigur seg hava hug at royna seg í onkrari aðrari kapping enn í tí donsku. Harvið kroystir hann sjálvandi FCK at betra um tilboðið, sum teir áður hava givið honum.

Landsliðsmálverjin í Silkeborg, Peter Kjær, hevur sáttmála við sítt felag tað, sum er eftir av hesum álmanakkaárinum. Tað er neyvan nakar ivi um, at Silkeborg er áhugað at halda fram við samstarvinum. Tað er ein spurningur um pengar, og tað nervakríggið er ikki liðugt enn.

Og so verður tosað um møguleikan fyri, at fyrrverandi FCK málverjin, Karim Zasa, sum hetta seinasta árið hevur verið í OB, ikki er nøgdur við lønina og tískil hóttir við at stinga av, um hann ikki fær meiri í lønarposan.

Í onkrum av hinum feløgunum eru málverjarnir hálvgamlir, men sum kunnugt er aktiva lívið hjá einum málverja nógv longri, enn tað er hjá øðrum fótbóltsspælarum.

Tað verður dúgliga lisið á sjónvarpsskíggjum og teldum fyri at frætta, hvussu tað verður við fótbóltsframtíðini hjá Jákupi Mikkelsen. Vit halda okkum kunna siga toluliga víst, at næsta framtíðin fer ikki at vera í KÍ, men tað ger kanska ikki so nógv, tí sunnudagin vísti Meinhard Joensen stóra styrki í KÍ málinum!

# Talvið hesa vikuna

**Torført hevur verið at fáa fatur á talvunum frá kappingini, bert nøkur heilt fá frá 1. umfari eru til taks. Martin telvaði hetta talvið frá 1. umfari væl, hevði møguleikar, men tapti tíverri at enda.**

Brekká,M (2102) - Jørgensen,M (2290)
Tage Sørensen Memorial (1), 23.06.2001

## Hollendsk byrjan

1.d4 f5 2.c4 Nf6 3.Nf3 g6 4.Nc3 Bg7 5.g3 0-0 6.Bg2 d6 7.0-0 c6 8.e3 heldur passivt 8...Qe8 9.d5 Na6 10.Rb1 Bd7 11.Nd4 Nc7 12.b4 cxd5 13.Nxd5 Ncxd5 14.cxd5 Rc8 15.Bb2 Rc7 16.Qb3 (Støðan er sera jøvn, Martin hevur telvað trygt og væl) 16...Qa8! (Góður leikar frá danskari síðu, hann fær nú f-rókin við í leikin) 17.Rfd1 Rfc8 18.a4 (Martin átti heldur leikt Rbc1, og býtt rókarnir upp) 18...a6 19.a5 Kh8 20.Ne6 Rc2? 21.Bd4? (21.Nxg7 Kxg7 22.Rdc1 og hvítur hevur munin) 21...Bxe6 22.dxe6 Ng4 23.Bxg7+ Kxg7 24.Rb2 R2c3 25.Qd5 R8c7 26.h3 Nf6 (Svartur hevur nú lítlan yvirvág við betri rókasambandi) 27.Qd4 R3c4 28.Qb6 Qc8 29.b5 Ne4 30.Bxe4 (30.Bf1 hevði helst bjargað støðuni hjá Martini. Eftir hetta uppbýtt sær svart út hjá hvítum) 30...fxe4 31.bxa6 bxa6 32.Rd4 Rc1+ 33.Kg2 Qxe6 34.Qxa6 (Støðan er helst tapt hjá Martini, men ivaleyst hevur ikki sæð næsta vinnandi sterka leik hjá dananum)

Rh1!! 35.g4 Rcc1 36.f4 exf3+ 37.Kg3 Qxe3 0-1



# Sogndal gjørdi bart

**Eingin føroyingur var á vøllinum, tá Sogndal um vikuskiftið vann størsta tippeliga sigurin í søgu felagsins**

NOREG
*Jákup Mørk*

Eftir øllum at døma verður Sogndal skjótt uttan føroyingar, eftir at talan var um ikki færri enn tríggjar leikarar fyri bert einum ári síðani.

Í vetur fór Hans Fróði Hansen heim til Føroya, Julian Johnsson skiftir um eina viku til enska Hull, og Kurt Mørkøre hevur fingið frítt at fara frá felagnum, har hann í fjør varð nærum forgudaður av áskoðarunum.

## Metsigur

Hetta vikuskiftið var seinasti dysturin, sum Julian Johnsson kundi leika við felagnum, men hann taldist als ikki millum menningar á dómaraseðlinum, tá farast skuldi í holt við dystin móti Strømsgodset. Tað gjørdi Kurt Mørkøre heldur ikki, men saman kundu teir síggja Sogndal vinna størsta sigurin, sum felagið nakran tíð hevur vunnið í bestu norsku deildini.

Endaliga úrslitið gjørdist heili 5-0, og við sigrinum lyfti Sogndal seg væl og virðiliga leyst av niðurflytingarvandanum.

Longu í fyrsta minutti løgdu teir í Sogndal fyri, og eftir 3-0 í steðginum varð sigurin sligin so rimmar fastur í seinna hálvleiki.

Ananrs mistu bæði oddaliðini, Viking og Rosenborg, stig hetta vikuskiftið, og ikki minst er tað óvæntað, at vanliga suverenu Rosenborg longu hava roynt at tapt tvær reisur hetta kappingarárið.

# Støðan, norska tippeligan

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Viking | 12 | 8 | - | 3 | - | 1 | 26 | 13 | 13 | 27 |
| 2 | Rosenborg | 12 | 8 | - | 2 | - | 2 | 32 | 15 | 17 | 26 |
| 3 | Odd. Grenl. | 12 | 7 | - | 2 | - | 3 | 25 | 12 | 13 | 23 |
| 4 | Lillestrøm | 12 | 7 | - | 2 | - | 3 | 25 | 17 | 8 | 23 |
| 5 | Stabæk | 12 | 7 | - | 1 | - | 4 | 20 | 20 | 0 | 22 |
| 6 | Brann | 12 | 6 | - | 3 | - | 3 | 29 | 17 | 12 | 21 |
| 7 | Molde | 12 | 5 | - | 3 | - | 4 | 23 | 19 | 4 | 18 |
| 8 | Moss | 12 | 5 | - | 1 | - | 6 | 16 | 20 | -4 | 16 |
| 9 | Sogndal | 12 | 5 | - | 0 | - | 7 | 17 | 25 | -8 | 15 |
| 10 | Lyn | 12 | 2 | - | 4 | - | 6 | 17 | 19 | -2 | 10 |
| 11 | Strømgodset | 12 | 2 | - | 4 | - | 6 | 16 | 31 | -15 | 10 |
| 12 | Tromsø | 12 | 3 | - | 0 | - | 9 | 8 | 22 | -14 | 9 |
| 13 | Bodø/Glimt | 12 | 1 | - | 5 | - | 6 | 12 | 22 | -10 | 8 |
| 14 | Bryne | 12 | 2 | - | 2 | - | 8 | 13 | 27 | -14 | 8 |